# KÍ bjóðar øllum á »Ítróttarnátt«

**Klaksvíkingar eru framvegis í festivalhýri, og tað ætlar KÍ, at teir skulu sleppa at vera í nakrar dagar afturat. Í hvussu er alt fríggjakvøldi við, tí tá bjóðar felagið nevnliga til eitt ókeypis og rættiliga øðrvísi tiltak, har øll hava høvi at luttaka í bæði ítrótti, ítrivum og sangi**

FRÍTÍÐ/ÍTRÓTTUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Gongur tú við einum fjaldum dreymi um at sleppa at royna at standa á vatnskíð, at skógva ein hest, at seta segl ella okkurt heilt annað, so er bara at møta á »Ítróttarnáttini« í Klaksvík fríggjakvøldið. Tað skuldi nevniliga verið sera løgi, um tú ikki finnur okkurt ítróttar- ella frítíðarítrív, sum hevur júst tín áhuga.



*- Seinasta vikuskifti prógvaði jú væl og virðiliga, at tað saktans ber til at savna nógv fólk um eitt stórt tiltak her í býnum, so vit hava sera góðar vónir, sigur Finn Jóhannesen, samkipari av "Ítróttarnáttini" sum verður fríggjakvøldið í Klaksvík*

### Brellbiti

Hugskotið við Ítróttarnáttini er, at øll tey ymsu ítróttar- og frítíðarfeløgini í býnum fáa høvi at vísa fram, hvat tey takast við, og at øll onnur samstundis fáa møguleika at royna tær ymsu ítróttargreinirnar ella frítíðarítrivini. Finn Johannessen, samskipari, leggur dent á, at hetta ikki nøkur kapping ella framsýning, men at tað fyrst og fremst er gleðin við at luttaka í eini ítróttargrein ella ítrivi sum drívir verkið. Finn dylur tó heldur ikki yvir, at tiltakið eisini er ein roynd at stimbra hugin hjá fólki at røra seg meir og samstundis vísa, at ongum nýtist at verða við á einum toppliði fyri at røkja kroppin. Hann ivast ikki í, at tey eru nógv, sum kundu hugsað sær at verið meir virkin, men ikki rættiliga vita, hvussu tey skulu koma í gongd. Nú fáa tey so ein livandi brellbita og eisini høvi at fáa eitt prát við fólk úr teimum ymsu feløgnum.

### Ítróttar- og tónleikafestival

Nú KÍ hevur valt at royna hetta hugskotið, er tað eisini sum liður í 100 ára hátíðarhaldinum hjá felagnum, sum fevnir um eina røð av tiltøkum gjøgnum alt árið. Men ikki bara. Finn sigur, at KÍ leingi hevur havt ætlanir um at skipa fyri onkrum øðrvísi tiltakið, har øll kunnu vera við, og at nú tóktist rætta løtan at vera komin.

– Summarfestivalurin prógvaði jú væl og virðiliga, at tað saktans ber til at savna nógv fólk her í býnum um eitt stórt tiltak fyri øll, so tað er ikki minst við íblástri frá seinasta vikuskifti, Ítróttarnáttin nú ferð av bakkastokki, sigur Finn. Hann leggur afturat, at um hetta eydnast væl, er tað ikki óhugsandi, at Ítróttarnáttin verður løgd saman við Summarfestivalinum næsta ár sum eitt afturvendandi tiltak.

Og tað skuldi borið væl til, tí umframt ítrótt og ítriv, verður eisini nógvur tónleikur á skránni fríggjakvøldið. Klokkan 20 fara tær ymsu samkomurnar í býnum at skipa fyri café og sangi niðri við Sparikassapallin, har onkur gospelbólkur eisini verður at hoyra. Eisini hava vælumtóktu »I am« valt at hava konsert hetta kvøldið, og fara teir á pallin í Atlantis kl. 22. Ítróttarnáttin endar á midnátt við eini kvøldsetu í KÍ- høllini, har skipað verður fyri felagssangi og øll fáa ókeypis suppu.

Finn sigur, at tað hevur verið sera hugaligt at skipa fyri Ítróttarnáttini, tí øll tey ymsu feløgnini hava verið sera positiv líka frá byrjan. Hann ivast ikki í, at fólk fara at taka væl ímóti hesum nýggja tiltaki, og so er bara at vóna, at eisini veðurgudarnir verða í góðum hýri.

Skráin fyri »Ítróttarnáttina« er at síggja aðrastaðni í blaðnum í dag.

# Úr grannalagnum

**Listamaðurin Josias Matras leitar aftur á gamlar gøtur í myndum, sum eru at síggja í Leikalund í løtuni**

MYNDLIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í løtuni er høvi at síggja eina røð av blýants/pennamyndum hjá listamanninum Josiasi Matras í Leikalund í Klaksvík. Josias er føddur og uppvaksin á Vágsheygnum, og hóast myndirnar ikki hava heiti, er tað týðiligt, at íblásturin kemur úr grannalagnum har um leiðir. Onkur mynd er úr Trøllagili, meðan aðrar leita sær longur niðan móti Borðoyarvík og neystunum har.



*Við einfaldum strikum gevur listamaðurin Josias Matras grannalagnum uppi á Vágsheyg ein heilt serligan friðsælan og heimligan dám*

### Aftur á gamlar gøtur

Josias hevur málað og teknað síðani hann var heilt ungur og hevur verið við á fleiri Norðoyastevnu- og Ólavsøkuframsýningum. Við jøvnum millumbilum hevur hann verið á skeiðum í myndlist uttanlanda, og gjøgnum árini hevur hann roynt seg við bæði vatnlitsmyndum og oljumálningum frá tí naturalistiska til tað meir abstrakta.

Hesuferð tykist hann tó at leita aftur á gamlar gøtur, bæði tá tað snýr seg um myndevni frá nærumhvørvinum og tann meir einfalda skitsuteknikkin. Og tað er júst tað einfalda, sum ger hesar myndirnar hjá Josiasi so hugtakandi, og sum beinanvegin sannførir áskoðaran um, at listamaðurin dugir sítt handverk og meir enn tað. Við einfaldum strikum og lættari hond manar hann fram lív og dýpd í einsamøllu húsini og tómu neystini, sum uttan annað hóvasták spakuliga fáa ein heilt serligan friðsælan og heimligan dám yvir seg.

Myndirnar hjá Josiasi verða at síggja í Leikalund í nakrar dagar afturat.





# Status Quo

**Stjórin á Skipafelagið Føroyar, Árni Joensen, sigur, at hóast broytingar eru gjørdar í ognarviðurskiftunum hjá Eimskip og Skipafelagnum, verður ikki talan um nakra kollvelting í dagliga arbeiðinum**

SKIPAFELAGIÐ FØROYAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




Týsdagin kom undan kavi, at íslendska felagið Eimskip og 85 ára gamla Skipafelagið Føroyar hava gjørt av at leggja saman í eina stóra flutningsfyritøku. Talið av flutningsveitarum í Føroyum er tískil fækkað úr fýra niður í trý feløg. Umframt samanløgdu fyritøkuna eru Smyril Line og íslendska Samskip á føroyska marknaðinum.

Stjórin á Skipafelagið Føroyar, Árni Joensen, sigur, at samanleggingin fer ikki fer at elva til stórvegis broytingar í dagliga arbeiðinum hjá nýggja felagnum.

### Varðveita skipini

Seinastu mongu árini hava Lómur og Blikur verið álitið hjá Skipafelagnum, og sambært stjóranum Árna Joensen fara drúgvu flutningsskipini at halda á við tí. Eimskip hevur havt eitt skip í Føroyum um vikuna, og eftir øllum at døma verður skipið hjá Eimskip framhaldandi partur av Føroyaleiðini.

– Vit fara altíð at hyggja at, hvørji skip eru best egnaði til okkum, og hvussu vit best gagnnýta samlaða kapacitetin. Sum støðan er í løtuni varðveita vit Lóm og Blik, umframt at skipið hjá Eimskip legst afturat.. Tað kortini givið, at vit áhaldandi verða noyddir at tillaga okkum eftir eftirspurninginum, og tí er ómetaliga torført at geva eitt endaligt svar, hvussu nógv skip, vit fara at nýta, sigur Árni Joensen.

Seinnu árini hevur Skipafelagið leiga eitt eyka skip á Føroyaleiðini, og stjórin á Skipafelagnum útihýsir ikki, at hetta skip fellur burtur eftir at samanleggingin gjørdist veruleiki.

### Almenni parturin

Upprunaliga átti tað almenna ein stóran ognarpart í Skipafelagið Føroyar, men almenni parturin er fánaður nógv seinnu árini. Til miðskeiðis í fimtiárunum átti tað almenna góðan helmingin av felagnum, men ognarparturin í Skipafelagið Føroyar í dag er ikki størri enn góð 3%.

### Starvsfólkini

Góð 200 fólk starvast í dag á Skipafelagnum. Í Degi og viku týskvøldið segði Árna Joensen, at tað var ikki óhugsandi við tíðini, at uppsagnir komu upp á tal við. Spurdur um starvsfólkini vórðu kunnað um samanleggingina og møguligu avleiðingarnar av henni, svarar stjórin á Skipafelagið Føroyar, at tað vóru tey ikki.

– Eimskip er skrásett á virðisbrævamarknaðinum, og har eru greiðar reglur um, at samanleggingar ikki skulu koma fram í ljósmála, áðrenn alt er komið upp á pláss. Vit hava tí ikki havt møguleikan at boða starvsfólki okkara frá, áðrenn samanleggingin endaliga kom í hús, vísir Árni Joensen á.

### Tryggari

Hvussu fer kundin at merkja samanleggingina?

– Eg eri sannførdur um, at samanleggingin fer at bøta munandi um tænastustigið og tryggleikan hjá kundunum. Sum flest øll vita eru Føroyar búskaparliga eitt rættiliga viðbrekið samfelag, og tí kemur tað væl við at vit sleppa at troyta teir møguleikar, sum íslendska sambandið við evropeiska meginlandið gevur okkum.

### Verður tað bíligari?

– Tað dugi eg ikki at siga. Hjá okkum sum fyritøku ræður sjálvsagt um at vinna sum mest av peningi, meðan kundin sjálvsagt eisini hevur tað sum mál. Tað verður kappingin, sum fer at gera av, hvørjir prísir, vit fara at veita kundum okkara í framtíðini, sigur Árni Joensen

### Ov tíðliga

Árni Joensen dugir ikki í løtuni at siga, hvussu nýggja felagið fer at húsast í framtíðini. Skipafelagið hevur seinastu mongu árini hildið til á Eystaru bryggju, meðan Eimskip hevur ein nýggjan bygning á Skansabryggju.

– Nú eiga vit so tveir bygningar í felag, men tað er ógjørligt hjá mær í løtuni at siga, hvat hendir við teimum. Møguliga verður tørvur á báðum teirra, og um ikki, so finna vit eina loysn til ta tíð. Um nakrar vikur fæst nærri at vita hvat og hvussu, vísir Árni Joensen á.

## Smyril Line bíðar

Argasti kappingarneytin hjá nýggja samanlagda felagnum er Smyril Line. Fíggjarstjórin á Smyril Line, Jóannes á Váli, dugir ikki at siga, hvussu samanleggingin av Skipafelagið Føroyar og Eimskip fer at ávirka støðuna hjá Smyril Line í framtíðini.

– Tað er ov tíðliga at siga. Veruleikin er, at nú er ein veitari færri á føroyska marknaðinum, og tað er ein nýggj støða. Vit vita snøgt sagt ikki hvørjar ætlanir samanlagda felagið hevur, og tí ber illa til at siga, hvør ávirkanin verður. Komandi vikurnar verður óivað greiðari, hvat samanlagda felagið ætlar sær, sigur Jóannes á Váli í stuttari viðmerking.

**-Páll**

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2